# Lyklaorðini

## Hví verða limur?

### Styrki

Tað er ein sannroynd, at vit standa sterkari í felagsskapinum, einsamøll flyta vit einki. Saman hava vit betri fortreytir til at samráðast um betri lønar- og arbeiðskor.

### Rættindi

Sum løntakari hevur tú rættindi, sum fakfelagsrørslan hevur vunnið tær. Felagið og álitisfólk okkara ráðgeva um tíni rættindi.

### Umboðan

Vilt tú hava ávirkan á viðurskiftini á arbeiðsplássinum? Felagið og álitisfólk okkara tosa tína sak, á arbeiðsplássinum og við samráðingarborði.

### Vernd

Ver partur av felagsskapinum, sum verjir teg á arbeiðsplássinum.
Felagið veitir løgfrøðiliga hjálp og málsviðgerð í málum um órætta viðferð á arbeiðsplássinum, broytingar, uppsagnarmál o.a.

### Trygd

Allir limir eru fevndir av skipanini við eftirløn og samlagstrygging.
Samlagstrygging er: trygging við hættisligum sjúkum hjá tær/børnum, lívstrygging til eftirsitar, hjúnafelagatrygging og ískoyti til hoyritól.

## Títt felag

Starvsfelagið er felagið, sum tú vendir tær til, tá tú hevur tørv á hjálp og ráðgeving um tíni viðurskifti á arbeiðsplássinum.

Starvsfelagið er til fyri at betra um lønar- og setanarkorini hjá limum. Vit verja teg á arbeiðsplássinum.

starvsfelagið